vanligt mannfólkaarbeiði. Eisini var Olea í Jákupsstovu í handlinum. Hon doyði eftir at hava fingið meslingar í meslingagrindini í 1935. Martha "hjá Sámali" var eisini í handlinum seinni. Hon og sonurin Sigfríður eru eisini keldur til upplýsingar í hesi grein.

Arbeiði var ikki nógv av fyrstu tíðina. Men Tummas Jakku var ágrýtin sum vinnu- og hugsjónarmaður. Hann var fyrsti roknskaparmaður hjá Føroya Fiskimannafelag, sum varð stovnað í 1911, eftir at fiskimenn í Gøtu høvdu tikið stig til tess í 1910.

Grundarlagið fyri vinnuskapanina hjá Tummas Jakku var motorbátar, sum menn høvdu til útróður. Eg haldi, at teir byrjaðu við teimum í 1917-18.

Tey fyrru árini leigaði Tummas Jakku motorbátar til Norðhavsróður. Í 1921 keypti hann saman við pápa, Peter Jacob, motorbátin Brynhild, uppkallaður eftir dóttir Tummas Jakku.

Um heystið 1922 keypti Thomas Jacob saman við Elias Sofus Hansen í Køkinum, hann gjørdist annars verfaðir Brynhild, sluppina Leonoru, men hon sakk á fyrsta túrinum úr Noreg til Føroyar. Tað var eingin mannskaði, men fíggjarligi missurin var stórur.

Í 1927 leigaði Thomas Jacob saman við øðrum Norðagøtumonnum Wellfare. Á heystið 1929 keypti hann saman við bygdamonnum Wilhelminu. Ein, sum sigldi við Wilhelminu, var Hans Petur Øregaard úr Lorvík, hvørs søga hevur verið í Miðvikuni.

Vilhelmina hoyrdi heima í Gøtu í eini fýra ár.Tá sleit hon yviri á Skálafjørðinum og gjørdist mestsum vrak. Men hon var afturgjørd, men tá fór hon á aðrar hendur.

Í 1927 keyptu Poli og Tummas Jakku sluppina Esther. Tummas Jakku reiddi hana út, og Poli førdi hana fram til 1932. Fram til 1935 var Jákup Andreas Poulsen, á Mýruni, í Syðrugøtu skipari á Esther.

Teir fiskaðu heilt væl. Fiskurin varð lagdur upp í Norðragøtu, har hann var vaskaður í fiskakjallarانum og síðan turkaður úti.

Um heystið varð fiskurin turkaður uppi á fiskaloftinum hjá Tummas Jakku, har ovnar vóru settir upp at turka fisk við.

Tummas Jakku var ein maður, sum gjørdi nógvar royndir, millum annað við snurrivodd og kalvagørnum.

Tummas Jakku keypti fisk, og tað komu eisini skip aðra staðni frá at landa til turkingar. Tað var alt breitt í fiski, heilt frá kirkjuni og út á Ennið, sum er uttanfyri verandi kai í Norðragøtu. Hetta var eitt sera gott pláss at turka fisk. Fiskurin varð førdur hagar við báti.

Í Syðrugøtu høvdu Jóan Pauli



F.v. Elsa í Blásastovu, Elspa Katrina, mamma hennara, og Sanna á Rætt úr Syðrugøtu



Hetta er gamli handilin hjá Tummas Jakku í Blásastovu. Menninir eru frá vinstru Joen Simin Vesturklett, Johan Gøthe og Tummas Jacobsen.

Gregersen og Símun í Ólastovu sluppina William Clowes. Marius Berg við Gøtugjógv hevði Galateu. Turkihúsið kom í Syðrugøtu í 1929. Alt hetta gav arbeiði í allari sóknini.

Sjálvt um tað var nógvur fiskur, vóru tó eingir pengar. Hetta var í ringastu krepputíð.

Í 1937 mátti Tummas Jakku lata skip og motorar frá sær og lata handilin aftur. Nakað seinni lat hann handilin uppaftur undir navninum Glæman.

## Handil og íshús

Eitt skifti var eisini ein annar handil í Norðragøtu. Hetta var Petur Hans Hansen úr Lorvík, vanliga kallaður Lítli Peter Hans fyri ikki at blanda við Langa Petur Hans.

Hann handlaði vist fyri teir á Gørðunum í Vági. Petur Hans var so fittur í hondunum. Hann plagdi at smíða borðbátar.

Peter Hans bygdi sær íshús, sum enn er til. Íshús vóru nógva staðni og komu undan frystihúsini. Her bar væl til at frysta við at blanda salt og kava saman. Kavi skuldi so fáast til vega, hann var borin í leypi fyri akkord. Um neyðugt var ísur eisini tikin úr ánni. Fyrst og fremst varð sild fryst til agn. Hon varð harðfryst, so væl riggaði tað. Eitt íshús hevði eitt rúm til kava og eitt annað til salt.

Aftaná Peter Hans yvirtók Jóhannes í Tjørnustovu handilin, men hann doyði í 1945. Beiggi hansara Eliesar hevði eisini handil í sínum kjallara í fleiri ár.

Handilin hjá Tummas Jakku varð, tá hann doyði í 1950, seinni yvirtikin av Tóru, dóttir Tummas Jakku, og manni hennara Eivind hjá Havna Jákup (Hansen). Her vóru eisini skip og fiskaarbeiði. Hann sum skrivar hetta fór til skips 3. juni 1958, fyri júst 50 árum síðan, við Báruni, har Eivind var reiðari. Men handilin varð stongdur fyri nøkrum árum síðan. Nú hevur abbasonur Tummas Jakku, Eyðun Hansen, sonur Brynhild og Hans hjá Elias Sofus, eltalvuvirki í bygninginum.

## Nótakompaní

Hesa tíðina varð sum minst av mati keyptur, um hann kundi útvegast á annan hátt. Ein máti var at kasta nót. Tað vóru tríggjar nótir her í Norðragøtu. Ein var kallað fyri Lítlanót. Í henni áttu tey í Blásastovu tríggjar partar.




Tummas Jakku og konan Magdalena saman við seks av teirra 13 børnum

Aðrir eigarar vóru tey í Frammistovu, Gamli Sámal Jakku og tey á Fløtti. Hetta vóru teir fyrstu eigararnir. Síðan fóru partarnir í arv. Pápi og Tummas Jakku fingu seinni partarnar í Blásastovu.

So var tað Stóranót. Millum tey, sum áttu hana vóru tey í Jákupsstovu og Langi Petur Hans. Triðja nótin kallaðist Garnið.

Vanligt var, at 12 mans áttu í hvørji nót. Hetta var tann manning, sum skuldi til, tá ið nót skuldi kastast. Tað hoyrdi eitt áttamannafar við neyst til hvørja nót.

Í Syðrugøtu høvdu teir eisini nótir. Tær kallaðust Seglgarnsnótin, Ullnótin og Nýggjanót. Nýggjunót áttu teir, sum ikki sluppu uppí part í hinum nótunum.

Nótirnar vóru nógv nýttar. Tá ið líkindi vóru um veturin kastaðu teir nót.

Hvørt kompaní hevði ein formann. Hann umsat seiðakikaran, sum var dánaður sum ein avlangur kassi við glasi í botninum. Tá ið hann var settur niður í sjógvan sást væl, um seiður var undir. Ofta stóð manningin klár á landi, meðan formaðurin kikaði, og tá ið hann rakti við, varð kastað. Fyrst varð annar endin settur í land. Nótin varð so frá bátinum sett um seiðatorvuna, og menn drógu hvønn sín enda av nótinum á land. Síðan varð fongurin tikin inn í bátin við kurvum. Veiðan var uppgivin alt eftir, hvussu nógvir bátar av seiði vóru í kastinum.

Tað var nógv at fáa viðhvørt. Seiðurin varð so kruvdur. Hetta var konufólkaarbeiði, sum var sera tíðarkrevjandi. Men tær vóru kvikar. Ofta var seiðurin stoyttur á gólvið í roykstovuni at verða kruvdur, soleiðis sum Heðin Brú greiðir so væl í bókini Feðgar á Ferð.

Seiðurin var fyri ein stóran part greipaður og hongdur upp. Hetta kundi vera undir húsunum og undir hjallinum, so ofta var nógvur seiður at síggja alla staðni í bygdini.

Hetta var góður matur. Turrur bukaður seiður smakkar væl. Men feskur seiður og livur var eisini framúr góður døgurðamatur. Neytini fingu eisini nógvan kókaðan seið og var hetta gott sum kraftfóður.

Tað varð býtt soleiðis, at nótin fekk ein part, og síðan var býtt millum menninar, sum vóru við. Formaðurin mundi eisini fáa eitt sindur eyka.

Livurin varð tikin og seld. Tummas Jakku keypti hana. Hann hevði lýsismeltarí, eins og tað var í nógvum bygdum. Á tí økinum vóru teir gomlu meira framkomnir enn vit enn eru í dag í Føroyum.